

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 05 - 2013

# Oljuvinnan gjalda meira í skatti

Norski forsætisráðharrin hevur lagt fram ein vakstrarpakka, ið inniheldur tiltøk, sum norski staturin fer at seta í verk fyri at steðga gongdini við einum tvíbýti av norska búskapinum. Vakstrarpakkin fer at styrkja vinnuna á landi, gera hana meira kappingarføra og harvið tryggja arbeiðspláss, sigur Jens Stoltenberg. Stjórnin skjýtur m.a. upp at minka um avskrivingarnar í oljuídnaðinum, soleiðis at oljufeløgini skulu gjalda 3 mia. kr. meira í skatti, meðan partafeløg í ídnaðinum á meginlandinum fáa tilsvarandi skattalættar. Endamálið við tiltøkunum er at minka um gjónna millum ymsu partarnar av vinnulívinum og stimbra íløgur í vinnunum á meginlandinum, og harvið geva sítt íkast til eina betri javnvág í norskum búskapi.